Kvæðasavningin

Samstundis sum kvæðaskaldskapurin umleið 1800 fær at kalla eina endurføðing, fara menn av álvara at festa á blað tey kvæði og teir tættir, sum fedrarnir høvdu varðveitt á mannamunni gjøgnum fleiri ættarlið.

Onkrar uppskriftir liggja nakað frammanundan, men høvuðssavn-ingin tekur seg upp frá 1820 og úteftir og endar við stóra savninum »Føroya kvæði«, sum arbeitt varð við í árunum 1872-76.

Umrøðan verður nú her skift

sundur í trý: A: Fyrstu uppskrift-irnar. B: Høvuðssavningin. C: Heildarsavnið »Føroya kvæði«.

Fyrstu uppskriftirnar

Fyrsta vit vita um uppskriftir av føroyskum kvæðum, er tá kendi danski fornminnissavnarin Ole Worm heitir á Havnarprest Hans Rasmus-sen um at senda sær nøkur dømi um føroysk kvæði. Hetta er í 1639.

Hesin so ger, men tíverri fóru hesar uppskriftir fyri skeyti, tá stóri eldsbrunin herjaði Keypmannahavn í 1728, Men av avskriftum, sum Peder Syv gjørdi, vita vit, at uppskriftirnar vóru fimm í tali, tær vóru hesar: »Koralds kvæði«, »Torsteins kvæði«, Hermundur Illi«, »Samsons kvæði« og »Berrings vísa«.

Næstu ferð vit bera við kvæða-uppskriftir, er tá Svabo í 1770-áru-num fer undir sína savning. Bæði kvæðasøvn hansara eru umrødd undir viðgerðini av Jens Chr. Svabo á s. 44; her skal bara verða lagt afturat, at Chr. Matras, professari, í 1939 savnaði hesi bæði handrit í bók, »Svabos Færøske Visehaand-skrifter«.


Høvuðssavningin

Vit mugu siga, at samtíðargransk-arar sýndu ikki vísuuppskriftum Svabos stóran ans. Ikki fyrr enn í 1811, tá danin Rasmus Rask gav út »Vejledning til det Íslandske eller gamle Nordiske sprog«, har hann m.a. nevnir vísuhandrit Svabos sum keldu til føroyska partin av bókini, kunnu vit siga, at tilfarið aftur kemur undan kavi.

Men tað er ikki fyrr enn danin H.C. Lyngbye í 1817 aftan á Føroya-ferð í øðrum enn kvæða-granskingarørindum kann vísa á, at partar úr hini gomlu Vølsungasøgu finnast í Føroyum í kvæða-sniði (Sjúrðarkvæði), at granskarar av álvara fara at venda eygunum hendan vegin móti kvæðunum, sum føroyingar gjøgnum øldir høvdu varðveitt á mannamunni. Her kunnu vit viðmerkja, at Svabo í sínum handritum (sum áður nevnt 55 kvæði tilsamans) ikki hevur nakran tátt úr Sjúrðar-kvæðunum, og tað má undra fólk, sum annars altíð hevur hoyrt, at júst Sjúrðar-kvæðini eru høvuðsbólkurin í kvæða-savni okkara.

Uppskriftir Lyngbyes frá 1817 vóru bert brot úr Sjúrðarkvæðunum, ov lítið fullfíggjað til, at Lyngbye kundi byggja bert á tey, tá hann — stuðlaður av dr. theol P. E. Müller, sum var sera kønur í norðurlanda skaldskapi — fór at hugsa um at geva út bók við føroyskum kvæðum. Hann mátti fáa sær til vega uppskriftir frá fólki, ið dugdi føroyskt. Tí heitti hann á J. H. Schrøter, prest í Suðuroy (umrøddur

gjølligari á s. 68), sum í 1819 sendi vísuuppskriftir til hansara. Hesar nýtti Lyngbye sum grundarlag undir útgávuni av fyrstu prentaðu bók á føroyskum: »Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans æt«, sum kom út í Randers 1822.



Færoiſke Qvæder
om
Sigurd Fofnersbane og hans Æt.
Med et Anhang.

Samlede og overſatte
af
Hans Chriſtian Lyngbye,
Sognepraſt i Gjeſſing.

Med en Indledning af P. E. Müller, Dr. og Prof. i Theol.
udgivne ved kgl. allernaadigſt Underſtøttelſe.

Drengene i Dragsund paa Færöe.

Randers 1822.
Trykt hos S. Elmenhoff, kgl. priv. Bogtrykker.

Fyrsta bók, útgivin á føroyskum

Seinni hevur Chr. Matras, professari skipað fyri eini útgávu av kvæða-handriti Schrøters: »J. H. Schrøters

optegnelser af Sjúrðar kvæði«, sum kom út í 1953.

Áður er nevnt, at granskarar fingu áhuga fyri føroyskum kvæðum, tí teir her kendu aftur tilfar úr søgum, sum teir kendu aðrastaðni frá. Verk Lyngbyes loypti brell á aðrar, og tað næsta, sum hendi, var, at P.E. Müller, sum hevði skrivað inngangin í Bókini »Qvæder om Sigurd Fofnersbane og hans æt«, sendi áheitan til Føroya prást, Peder Hentze, og bað hann útvega sær kvæðauppskriftir.

Hendan áheitan setti gongd av álvara í savningararbeiðið, og úrslitið var fleiri handrit, sum bera navn eftir oynni ella bygdini, haðan uppskrivarin var ættaður.


Vit fara nú at greiða frá nøkrum av hesum handritum.

Sandoyarbók:

Tá Peder Hentze próstur fekk áheitanina frá P. E. Müller, vendi hann sær til heimasandsmannin Johannes Clemensen, vanliga róptur Jóannes í Króki, sum var føddur 1794 og doyði í 1869.

Prósturin visti, at Jóannes hevði áhuga fyri kvæðunum, hevði gott minni og var kringur við penninum. Longu í 1819 kundi Hentze senda P. E. Müller 18 kvæði, skrivað við hond Jóannesar.

Hendan byrjan eggjaði Jóannesi í Króki at halda fram við at skriva upp kvæði, og í tíðarskeiðnum



146 BRINILDA.

45. Grymur og Högnar, Jûka Soon,
Tajr ſlonuſt vi bitrun Brandi,
Brinild ſitur uj Vâalua,
Midt uj Feâirs ſujns Landi.

46. Settiſt attur uj gjiltan Stouli,
Hoon ſmujliſt undur Lujn,
Qvör uj heldur aa Vâaluan,
Han ſkeâl vera mujn.

47. Brinild ſitur uj gjiltan Stouli,
Teâ hit veâna Vujv,
Drevur hoon Sjûra eâv Nordlondun
Uj Hildarhaj til ſujn.

48. Brinild ſitur uj Hildarhaj,
Teâ hit veâna Vujv,
Drevur hoon Sjûra eâv Nordlondun
Seâr tiil Sørgar Tuj.

49. Ajn Deâ frattir Sjûrur
Burtur uj ödrum Land:
Brinild ſvévur aa Hildarhaj,
Hoon eer Bilar vaant.

til Tournering og Ridderſpil om ſig ſelv; dog har jeg ikke udſlettet diſſe Vers, ſordi Prof. Müller har underrettet mig om, at der netop paa dette Punkt af Hiſtorien findes ogſaa i Volſungaſaga nogen Vilderede.

Ein síða úr fyrstu bók, ið prentað varð á føroyskum


1821 — 31 reinskrivaði hann kvæða-uppskriftir sínar. Í eftirskrifti í handritinum endar hesin merkis-maður: »Saaledes er nu denne Kvædebog fuldfærdiget i Aaret 1831 den 6te juli af Johannes Clemensen«. Bókin er í kvartstødd,

løðini eru 431 og kvæðini 93 í tali.

Í 872 keypti danin Svend Grundtvig ókina frá teimum, ið sótu eftir Jóannes, av henni navnið Sandoyar-bók og gav ongliga bókasavninum í Keypmannahavn hana.

Verk Jóannesar gjørdist kent í oyggjunum, og fleiri fóru at royna seg sum kvæðauppskrivarar. Heilt vist er tað, at Jóannes legði summum av hesum kvæðauppskriv-arum lag á.

Fugloyarbók:
Hanus Hanusson bóndi í Útistovu í Hattarvík, sum var føddur í 1794 og doyði í 1854, var ein teirra, sum fekk uppskriftir frá Jóannesi sær til fyrimyndar. Hann skrivaði upp 96 kvæði, sum fylla 399 síður í folio-stødd. Fugloyingurin Hans David Matras (1819 — 1875), sum seinni ognaðist bókina, skrivaði inngang og registar og sendi hana í 1854 til vinmann sín V. U. Hammershaimb. Handritið finst nú millum skriftir Hammershaimbs á Árnasavni í Keypmannahavn, men tað er ongantíð komið út í bók fyri seg.



Síða úr handritinum: Sandoyarbók.

Kvæðasavn úr Sandvík: Hans Pauli Johan-Petersen í Sandvík hevði gjørt kvæðasavn liðugt 1. apríl 1837.

Savnið er í tveimum pørtum, hevur tilsamans 20 kvæði. Jørgen Bloch, ið er nærri umrøddur undir deild C í hesum parti á s. 66, fekk hetta savn til láns frá H. N. Jacobsen, bókhandlara í Havn í 1885. Nú verður tað goymt á Landsbókasavninum í Havn, men tað er ongantíð komið út í bók fyri seg.

Koltursbók:

Tomas S. P. Rasmussen, bóndi í Koltri, hevði skrivað hetta savnið í 1848 — 48 kvæði, 474 síður — og gav Dr. Jacobsen tað í 1887. Tað verður nú goymt á Fróðskaparsetri Føroya, men ongantíð er tað komið út í bók fyri seg.

Sunnbiarbók:

Brøðurnir Jacob Symphor Johannesen (1823- 1846) og Joen Johannesen (1828-1873) í Sumba høvdu í 1851 skrivað hetta savnið liðugt. Tað er í oktav-støddi, kvæðini eru 12 í tali, og so eru uppií í eisini nakrar danskar vísur. Dr. Jakobsen fekk á ferð í Suðuroy í 1904 fatur á savninum og syrgdi fyri, at tað kom við upp í heildarútgávuna av »Føroya kvæði«. Handritið verður nú goymt á Føroya Landsbókasavni í Tórshavn.

Enn er at nevna størsta savnið, sum einsamallur maður legði úr hondum; tað er savnið hjá Napoleon Nolsøe, landslækna, men tað verður viðgjørt í næsta parti í sambandi við umrøðuna av hesum manni.

Her skal eisini verða nevnt, at V.U.Hammershaimb (1819 — 1909), sum verður viðgjørdur í serstøkum parti fyri seg á s. 79, eisini skrivaði upp kvæði.

Heildarsavnið »Føroya kvæði«

Vit hava nú nevnt fleiri føroyingar, sum savnaðu tilsamans ein hóp av kvæðum. Um somu tíð situr danin Svend Grundtvig (1824 — 1883) og savnar saman tilfar til verkið »Danmarks gamle folkeviser«. Hann fær eisini gjøgnum vinskap sín við Hammershaimb áhuga fyri føroyska kvæðatilfarinum, og tá einki røktist fyri, at Hammershaimb fór at gera eina heildarútgávu burtur úr hesum tilfari, tók Svend Grundtvig sær sjálvur um reiggj og setti í verk arbeiðið við heildarsavni, sum fekk navnið »Føroya kvæði — ella Corpus Carminum Færoensium. Færøernes gamle folkeviser, med tillæg af nogle nyere i alle tilgængelige optegnelser«.

Saman við svági sínum Jørgen Bloch (1839-1910) arbeiddi Svend



Svend Grundtvig

Grundtvig í fyrstu atløgu í árunum 1872 — 76 við hesum verki. Tá vóru evnað til 15 bind, sum taldu tilsamans 7300 síður. Í 1889 kom 16. bind, og ávikavist í 1896 og 1905 komu »lste supplement« og »2det supplement«.

Frá umleið 1940 fóru N. Djurhuus, Chr. Matras o.a. at skipa fyri prent-aðari útgávu av hesum verki.

Tilsamans eru kvæðini í »Føroya kvæði« 236, men her má so havast í huga, at til hvørt teirra eru fleiri uppskriftir, soleiðis at her ber til hjá tí áhugaða at síggja t.d., hvussu

kvóðu sumbingar ávíst kvæði, hvussu kvóðu sandoyingar tað, hvussu kvóðu fugloyingar tað? o.s.fr.

Hesir somu menn, Svend Grundt vig og Jørgen Bloch, evnaðu eisini til eitt orðabókahandrit, sum millum manna hevur verið kallað »Lexicon Færoense«. Teir bygdu fyrst og fremst á orðabókaverk Svabos og Mohrs, men tóku eisini við orð úr týðingum Schrøters (viðgjørt seinni á s. 68— 73) og úr arbeiði Hamm-ershaimbs (viðgjørt á s. 79).



Jørgen Bloch

Handritið telur tilsamans 15.000 orð og ber heitið: »Svend Grundtvigs færøske ordbog. Bekostet af den Hjelmstjerne-Rosencroneske stiftelse.

Lexicon Færoense indholdende Jens Chr. Svabos og Nicolai Mohrs ordbogsarbejder i fuldstændigt sammendrag med tilføjelse af citater og nye artikler samt lister over færøske person- og stednavne udarbejdet efter Svend Grundtvigs plan og under hans ledelse og medvirkning af Jørgen Bloch. København 1887 — 88«.

Handritið verður nú goymt á Kongliga bókasavninum í Keypmannahavn.

AÐRAR BÓKMENTIR:

Jón Helgason:

»Færøiske studier I. Den eldste optegnelse av færøiske kvad«. Maal og minne 1924. *Chr. Matras:*

Inngangur í bókini »Schrøters optegnelser af Sjúrðar kvæði«, 1951—53. *M. A. Jacobsen:*

»Jóannes Klæmintsson í Króki«. Varðin 9, s. 2. *M. Sørlie:*

»Om målet i Johannes Klemensens kvædeopskrifter«. Inngangur í bókini

»Sandoyarbók I«,